## VIÐMERKINGAR

# Løgin málsviðgerð

**Kári P. Højgaard**
*løgtingsmaður*



Ein arbeiðsbólkur hevur latið úr hondum álit um undirsjóvartunnil millum Suðureysturoy og Suðurstreym, umframt tunnil millum ytru armarnar á Skálafjørðinum. Uttan iva hevur bólkurin gjørt eitt dygdargott arbeiði og hava limirnir eisini ein førleika og fakliga vitan, ið borgar fyri, at úrslitið ið fyriliggur er gott støði at byggja víðari á, men sum teir sjálvir søgdu. “Tað er komið so langt sum komast kann uttan tær stóru íløgurnar, men nú má peningur til og talan er um milliónaupphædd”.

Almennur kunningarfundur varð fyriskipaður á Svangaskarði av politisku feløgunum fyrst í desember, har arbeiðsbólkurin sera náðgreinliga greiddi frá verkætlanini. Fundir hava somuleiðis verið fyri politisku flokkunum, og stutt undan jólum varð so kunnandi fundur í Tinganesi, har løgmaður, landstýrismenn, embætisfólk og umboð fyri Landsverk vóru møtt.

Lítil ivi man verða um, at fólkið á eystara armi ynskir at kunna koyra beinleiðis til Havnar uttan at fara yvir á Strendur fyrst. Helst hava strandingar og skálafólk sama ynski um at koyra beinleiðis til Havnar, uttan at noyðast at vitja yvir í Heiðar fyrst. Ein “Salomonisk loysn” á hesum spurningi varð eisini nevnd, tað var ein trýsporaður vegur til Havnar við tveysporaðari uppkoyring til eystara og vestara arm á Skálafjørðinum. Hendan loysn minkar um trýstið, og fær væntandi eina breiða undirtøku í fólkinum.

Nes - Runavíkar og Sjóvar kommuna hava saman við fíggingarfelag, valt umboð í eitt partafelag, sum saman við arbeiðsbólkinum skal arbeiða víðari við málinum. Umsókn um neyðug loyvir er send politiska myndugleikanum, Vinnumálastýrinum og nú er tað, at tokið eftir míni metan fullkomuliga fer av sporinum.

Í staðin fyri at samskifta við umsøkjararnar, verður málið fjølmiðlashow burturav. Landstýrismaðurin í Vinnumálum og Landsverk hvør í sínum lagi “yvirtaka” privatu verkætlanina og boða frá, at besta loysnin er at gera tunnilin millum Raktanga og SS, og at gera eina pelabrúgv millum Toftir og Strendur. Grundgevingin fyri brúgv er m.a., at hon er orkusparandi, og at betri møguleiki verður fyri at ferðast tvørtur um fjørðin, uttan at tað skal vera neyðugt at koyra í bili.

Tað kennist hugstoytt hjá mær sum fjarðbúgva og valdur sum kommunustýris / og løgtingslimur, at hoyra fremsta almenna ráðgevan, stjóran í Landsverk, koma við eini tilráðing um jólahalguna, har hann mælir til, at atkomumøguleikarnir til Skálafjørðin, størsta og besta náttúrhavn í Føroyum, skulu skerjast við eini stálbrúgv í fjarðarmunnanum. Hetta skaðar framtíðarmøguleikarnar hjá teimum størstu ferðamannaskipunumm og avmarkar eisini møguleikarnar fyri at fáa boripallar og aðrar størri flótandi eindir inn á fjørðin. Síðst men ikki minst kemur ein brúgv at verða áloypandi í umhvørvinum og skemma náttúrumyndina við fjarðarmunnan.

Tað er týdningarmikið at fáa greiði á, um útmeldingar landstýrismansins og hjá stjóranum í Landsverk eru hugleiðingar ella almenn krøv. Skal verkætlanin gerast veruleiki, eigur eitt neyvt samskifti at verða millum landstýrismannin, partafelagið og kommunurnar, ið standa aftanfyri verkætlanina.

Skálafjørðurin hevur virkað sum útgerðarhavn í sambandi við tær boringar, framdar eru í føroyskum sjóøki. Farmaflutningurin er minkaður munandi, men í ár vitjaðu fleiri ferðamannaskip her. Ein stór og týdningarmikil boring verður framd komandi ár, ið fer at geva nakað av avleiddum virksemi á landi. Hvat framtíðin annars hevur at bjóða Skálafjørðinum og fólkinum ið búleikast her, er ilt at meta um. Vit hava eitt arbeiðskapandi vinnulív og bestu møguleikar. Øll stig, ið verða tikin, mugu verða til framburð og menning fyri økið. Tí skulu eisini allir ferðsluspurningar til og kring fjørðin fremjast í samráð við lokalu myndugleikarnar, og ikki kroystast teimum niður yvir høvdið.

Eg vil til seinast boða frá, at eg haldi ætlanina við eini brúgvaloysn, har vit ongar royndir hava, vera fullkomuliga burtur úr vón og viti.

# Til prestin í Norðstreymoy Mogens T. Christensen

**Finnleif Guttesen**
*Tvøroyri*



Tá ið tú og onnur við tær brúka halgubók sum alibi fyri tykkara meiningar og døming av menniskjum, so undrist eg, tí tit, sum sokallað kristin, hava sjálvsagt lisið hesar orðingar í halgubók:

*Í tí, sum tú dømir annan fyri, fordømir tú jú teg sjálvan*
*Hyklari tín! Tak fyrst bjálkan út úr tínum egna eyga*
*Tí við dóminum, ið tit døma við, skulu tit verða dømd*

Tit misbrúka halgubók við at skapa andstygd og ótta, í staðin gleði. Lesi halgubók, men lat verða við at vannýta hana.

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 1 2006

# Eitt nýtt ár á fíggjarmarknaðunum

MARKNAÐARRÁK

2005 endaði friðarliga á fíggjarmarknaðunum. Fá tíðindi bórust, og lítið varð handlað. Í byrjanini av 2005 var tað dollarakursurin, sum stýrdi fíggjarmarknaðunum. Á vári tók oljuprísurin yvir so hvørt sum hann hækkaði. Í august rakk hann 70 dollarum fyri tunnuna. Síðan er hann lækkaður aftur, men lækkingin steðgaði á 52 dollarum fyri tunnuna. Í ár sær út til, at oljuprísurin aftur kann fara at spæla ein avgerandi leiklut á fíggjarmarknaðunum. Harafturat verður dollarakursurin áhugaverdur. Sammett við í fjør eru tær stuttu renturnar hækkaðar, eisini í Evropa, og í ár fara marknaðirnir væntandi at gita dúgliga, nær amerikanski tjóðbankin fer at steðga við rentuhækkingunum.

### Lánsbrøv støðug

Síðstu viku í 2005 varð sera lítið handlað á lánsbrævamarknaðinum, og hetta hevði við sær sveiggj í kursunum, sum vóru ógvusligari enn vanligt. 10-ára danska rentan endaði vikuna við at lækka 0,05% til 3,28%.

### Einki norðurlendsk partabræv er lækkað

Sum kunnugt hava partabrøv staðið seg ómetaliga væl í fjør. Nú 2005 er farið afturvið kann staðfestast, at einki av teimum 30 partabrøvunum í norðurlendska vísitalinum, FTSE Norex 30, lækkaði í 2005. Størstu hækkingina hevði svenska felagið Atlas Copco við 77%, meðan svenska fjarskiftisfelagið Tele2 stóð seg vánaligast við eini hækking á einans 2,6%. Hetta merkir, at vísitalið hækkaði 37,1%, íroknað vinningsbýti, í 2005. Sostatt eru norðurlendsk partabrøv meira enn tvífaldað í virði seinastu trý árini. Hóast hesa sera jaligu gongd, eru partabrøv sum heild ikki kostnaðarmikil og hampulig útlit eru fyri framhaldandi hækking.

### Hesa vikuna

Hesa vikuna verður USA í andgletti. Serliga verða eyguni havd við vinnuáliti og arbeiðsmarknaðarfrágreiðingini fyri desembur mánaða. Arbeiðsmarknaðurin sá gott út í 2005, og útlit eru fyri, at tann gongdin fer at halda fram.

Um so verður, stuðlar tað eisini undir partabrøvum á okkara leiðum.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 629,75 | 0,2% | ↑ |
| JPY | 5,35 | -1,1% | ↓ |
| GBP | 1.085,04 | -0,4% | ↓ |
| NOK | 93,38 | 0,4% | ↑ |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 105,06 | 0,3% | ↑ |
| Evru Lánsbrøv | 173,58 | 0,3% | ↑ |
| Norrøn Partabrøv | 108,94 | 0,5% | ↑ |
| Altjóða Vøkstur | 74,17 | 0,3% | ↑ |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*